Nr. 6 21. januar 2022

# Kunngerð um summartíð 2022 og 2023

Við heimild í § 1 í løgtingslóg nr. 66 frá 21. mai 1980 um summartíð verður ásett:

**§ 1.** Í árunum 2022 og 2023 verður nýtt serstøk tíðarrokning um summartíð í hesum tíðarskeiðum:

1) Í 2022 í tíðini millum 27. mars og 30. oktober.
2) Í 2023 í tíðini millum 26. mars og 29. oktober.

**§ 2.** Summartíðin byrjar á fyrstnevnda degi í hvørjum av tíðarskeiðunum kl. 01.00, og verður klokkutíðin tá broytt og sett til kl. 02.00.

*Stk. 2.* Summartíðin endar á síðstnevnda degi í hvørjum av tíðarskeiðunum kl. 02.00, og verður klokkutíðin tá broytt til kl. 01.00.

*Stk. 3.* Tann farni tímin verður í tíðarrokning tilskilaður sum kl. 01.00 B og tann komandi tímin sum kl. 01.00 A.

Løgmansskrivstovan, 21. januar 2022

**Bárður á Steig Nielsen (sign.)**
løgmaður

/ John Rajani (sign.)